# At lata flakavirkini uppaftur loysir ikki trupulleikarnar hjá Suðuroynni

**– Trupulleikarnir hjá Suðuroynni eru í tveimum. Í fyrstu atløgu er talan um tað bráðkomna arbeiðsloysið. Men í øðrum lagi verður eisini neyðugt at gera eina ætlan fyri, hvussu tað ber til at skapa ein fjøltáttaðan arbeiðsmarknað í Suðuroy, tí í framtíðini verður tað ikki tað vanliga fiskaarbeiðið, sum verður tann berandi vinnan**

ØKISMENNING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Tað eru grundleggjandi viðurskifti í Suðuroy, sum eru ein forðing fyri menning. Trupulleikin hjá Suðuroynni hevur eisini samband við, hvussu oyggin er skipað og tað er ongin ivi um, at tað verður neyðugt at leggja oynna í eina kommunu fyri at øll oyggin kann standa saman og draga somu línu, heldur Gestur Hovgaard, samfelagsfrøðingur*

– Nú er støðan í Suðuroynni so vánalig, at tað verður neyðugt við eini politiskari bjargingarætlan.

Tað heldur Gestur Hovgaard, samfelagsfrøðingur.

Gestur er sjálvur suðuroyingur og í sínum granskingararbeiði hevur hann fingist ikki sørt við økismenning.

Men hann heldur ikki, at ein politisk bjargingarætlan einsamøll, er nóg mikið.

– Tað verður eisini neyðugt at suðuroyingar vísa sama vilja til at fáa oynna á føtur aftur, sum teir vístu fyri 8-10 árum síðani, táið kreppan var seinast og tá ið teir settu fleiri virki á stovn

– Men tað er sum at eg hesuferð sakni tann øgiliga vilja til at reisa seg aftur, sum suðuroyingar vístu í seinastu kreppuni, tá ið fleiri virki vórðu sett á stovn.

## Trupulleikin býtast í tvey

Gestur Hovgaard heldur, at trupulleikin hjá Suðuroynni eiga at verða býttur sundur í tvey.

– Eitt eru teir trupulleikarnir, sum nú hesi seinastu árini hava stungið seg upp við einum stórum arbeiðsloysi.

– Ein annar trupulleiki eru teir langtíðartrupulleikarnar, sum Suðuroyggin hevur.

Hann sigur, at hetta eru ikki trupulleikar, sum hava stungið seg upp hesi seinastu árini.

– Hetta eru trupulleikar, sum byrjaðu longu í fimtiárunum. Síðani í fimtiárunum er fólkatalið í Suðuroy alsamt minkað, samstundis sum tað er alsamt vaksið í flest øllum øðrum økjum í landinum.

– Samstundis er aldursbýtið í Suðuroy blivið alsamt skeivari og skeivari við tað at tey ungu flyta av oynni, tí tey fáa ikki arbeiðið í Suðuroynni, serliga ikki tey, sum hava eina útbúgving.

Samfelagsfrøðingurin sigur, at sostatt kann avbjóðingin, bæði hjá landsins myndugleikum, og hjá suðuroyingum, býtast í tvey.

– Í fyrstu atløgu verður neyðugt at loysa teir bráðkomnu trupulleikarnar við arbeiðsloysinum.

– Men framtíðin hjá Suðuroynni er als ikki tryggjað fyri tað, tí tað verður eisini neyðugt at loysa langtíðartrupulleikarnar við fráflytingini, tí annars heldur fólkatalið á at minka og so er ongin framtíð.

Spurningurin er so, hvussu tað ber til at skapa arbeiðið í Suðuroynni her og nú.

– Sjalvsagt er tað neyðugt at lata tey arbeiðsplássini uppaftur, sum nú eru afturlatin.

Ì hesum sambandi heldur hann, at tað eisini er neyðugt at viðgera møguleikarnar fyri at fáa í lag beinleiðis flutningssamband ímillum Suðuroynna og Skotlands og betri samband innanlands.

– Suðuroyingar høvdu sera góðar royndir av tí beinleiðis sambandinum sum var ímillum Suðuroynna og Skotland, til Teistin varð seldur fyri nøkrum árum síðani. Tí er tað avgjørt vert at taka spurningin uppaftur, hvørja ávirkan eitt slíkt samband kundi fingið á menningina av Suðuroynni.

Men hann heldur eisini, at tað er neyðugt at bera so í bandi, at tað ikki skal kosta meiri at hava vinnu í Suðuroy enn tað ger aðrastaðni í landinum.

– Tað er ongin ivi um, at flutningsmøguleikarnir bæði innanlands og til útheimin eru ein trupulleiki fyri vinnuna í Suðuroyna.

## Samansjóða oynna

Men Gestur Hovgaard heldur eisini, at skal Suðuroyggin mennast aftur, verður neyðugt at viðgerða trupulleikarnar djúpari enn so.

Hann heldur, at tað eru grundleggjandi viðurskifti í Suðuroy, sum eru ein forðing fyri menning.

– Trupulleikarnir hjá Suðuroynni hava eisini samband við, hvussu oyggin er skipað.

Hann nevnir kommunuviðurskiftini, sum eitt dømi.

Í hansara hugaheimi er ongin ivi um, at tað verður neyðugt at leggja alla oynna í eina kommunu fyri at øll oyggin kann standa saman og draga somu línu.

Somuleiðis er hann samdur við nýggja sparikassastjóranum í Suðuroy, um, at tað er neyðugt at hava eitt vinnuráð fyri alla Suðuroynna og ikki sum nú, har eitt vinnuráð er fyri Suðuroyar syðru helvt, sum bara hugsar um syðru helvt, ímeðan tey longri norðuri á oyggj hugsa mest um tað, sum tænir norðaru helvt best.

– Eg haldi, at tað er ein sera stórur vansi hjá suðuroyingum, at teir ikki standa saman og draga somu línu mótvegis myndugleikunum í Havn, tí so óluksáliga stór er oyggin altso ikki, at frástøðan kann brúkast sum argument fyri nøkrum sum helst.

Hann vísur eisini á tann týdningin, sum Suðuroyar Sparikassi hevur fyri vinnuligu menningina í oynni.

– Eftir kreppuna í nítiárunum hevði Suðuroyar Sparikassi sjálvandi stóran týdning í royndunum at menna oynna aftur.

Men Gestur Hovgaard heldur kortini, at enn er Suðuroyar Sparikassi kanska nakað lítil.

Og hann heldur eisini, at tað er ein bági fyri Suðuroynna, at teir ikki standa saman um Suðuroyar Sparikassa í sama mun, sum norðoyingar standa saman um Norðoya Sparikassa.

Hann hevur varhugan av, at hóast talan er um ein sparikassa fyri alla Suðuroy og sum hevur stóran týdning fyri menningina av lokala vinnulívinum, hevur hann ikki heilt tað somu sterku støðuna ímillum fólkið í allari oynni, sum Norðoya Sparikassi hevur í øllum Norðoyggjum.

– Ein lokalur peningastovnur tryggjar, at teir lokalu pengarnir í Norðoyggjum eisini verða brúktir til lokalar íløgur.

Gestur Hovgaard heldur, at hevði suðuroyingar staðið líka sterkt saman um teirra sparikassa, sum norðoyingar standa saman um sín sparikassa, hevði Suðuroyggin staðið munandi sterkari.

– Tí er tað neyðugt, at suðuroyingar í enn størri mun uppfata Suðuroyar Sparikassa sum ein sparikassa fyri allar suðuroyingar og ikki bara ein sparikassi hjá vágbingum, sigur Gestur Hovgaard.

– Sjálvsagt hava hinir peningastovnarnir eisini týdning. Men ein lokalur pengatangi tekur heilt onnur atlit til lokala vinnulívið og tí hevði ein sterkari sparikassi í Suðuroy gjørt oynna munandi sterkara.

Samfelagsfrøðingurin ivast ikki í, at ein stór orsøk til at norðuroyingar megnaðu at endurreisa vinnulívið so skjótt eftir kreppuna í nítiárunum, var júst tann, at teir høvdu ein so sterkan, lokalan peningastovn, sum gav vinnulívinum heilt aðrar møguleikar.

## Tað skal meiri til

Hóast Gestur Hovgaard heldur, at tað er neyðugt at fáa arbeiði aftur á flakavirkjunum fyri at loysa tann bráðkomna trupulleikan, er hann kortini sannførdur um, at tað verður ikki tað vanliga fiskaarbeiðið, sum verður tann berandi vinnan í framtíðini og tí skal eisini annað og meiri til.

– Tað verða aðrar vinnur, sum koma at troka flakavinnuna av. Samstundis er tað prógvað við sjeytumma seymi, at ungdómurin hevur ikki hug at arbeiða á flakavirkið.

– Kortini skerst ikki burtur, at vit koma altíð at hava eina fiskivinnu og nøkur flakavirki og tað var ikki annað enn rímiligt, at suðuroyingar fingu sín part av tí.

– Men ungdómurin fær sær nógvar ymsar útbúgvingar og nógv ymisk arbeiði. Tí verður tað eisini neyðugt, at arbeiðstilboðini í Suðuroy eru passaliga fjøltáttað, so at ungdómurin hevur nakað at koma aftur til oynna til.

– Og tað verður tann stóra avbjóðingin í framtíðini at finna útav, hvussu arbeiðsmarknaðurin í Suðuroy kann gerast so fjøltáttaður at tað eru líkindi hjá teimum ungu at koma aftur.

Hann heldur, at hetta er ein uppgáva, sum tað almenna eigur at vera við til at loysa.

– Ein máti heldur hann er at leggja almennar stovnar kring landið. Tað hava vit royndir av aðrastaðni. Eitt nú er fiskivinnudirektoratið í Noregi ikki í Oslo, men í Bergen.

Hann heldur ikki, at slík spjaðing ger umsitingina dýrari.

– Tað er ikki rætt at alt er so bíligt, bara tað verður lagt saman í stórar eindir.

hann sigur, at Norðanfyri er hetta ikki tann stóri trupulleikin tí um eitt ár er 85% av Føroya Fólki samanbundið á meginlandinum, har tað sum onki ber til at búgva í Klaksvík og arbeiða í Havn.

– Men tann møguleikan hava suðuroyingar framvegis ikki og tí eiga politikarar at tora at flyta almenn arbeiðspláss til Suðuroyar.

– Men skal tað eydnast, verður eisini neyðugt at samansjóða oynna í eina eind og at leggja eina framtíðarætlan fyri alla oynna og tí vit mugu eisini koma burturfrá hugburðinum um, at Suðuroy er býttsundur í eina syðru- og eina norðaru helvt.

Í hesum sambandi hevur verið ætlanin at leggja miðnámsskúlan og heilsuskúlan í Hovi og at byggja røktarheim í Vági.

– Fyri so vítt dugi eg ikki at síggja nakran mun á, hvar í Suðuroynni ein miðnámsskúli verður bygdur.

– Bara hann verður bygdur!

– Men at lagt ein skúladepil, kanska ein ítróttardepil við og kanska eisini ein oyggjarumsiting á einum staði mitt í oynni, kundi eisini í longdini verið við til samansjóða oynna í eina eind.

Onkur hevur ført fram, at tað er skeivt at leggja slíkt á einum oydnum staði.

– Tað kann væl vera, men høvdu suðuroyingar blivið samdir um prinsippið í hesum, er hitt ein spurningur um teknikk. Annars vísir tað seg nógvastaðni, at verða slíkir stovnar og aðrir hentleikar bygdir á einum stað, fer eisini búseting at taka seg upp har rundanum, sigur Gestur Hovgaard.